# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Forseti á ferð

Í hesum døgum er Obama forseti á ferð í Asia, har hann millum onnur lond vitjar Japan og Kina. Stórur altjóða áhugi er fyri ferðini og hesin áhugi stavar ikki minst frá tí sermerktu støðu, sum er galdandi millum Kina og USA. Tað er ikki langt síðan, at Kina í USA varð mett sum ein hóttan móti støðu USA sum heimsins leiðandi og veruliga einasta stórveldi. Men nú er vent í holuni. Búskaparliga framgongdin í Kina stavandi frá polititiskum og búskaparligum broytingum og altjóðagerðini hevur tikið allan heimin og ikki minst USA á bóli. Kina hevur heimsins skjótasta vaksandi búskap, og Kina tekur seg stútt og støðugt inn á USA í kappingini um heimsins sterkasta búskap. Altjóða búskaparfrøðingar meta, at Kina um eini tíggju fimtan ár fer fram um USA, væl at merkja, um alt gongur sum nú. Afturat hesum kemur, at amerikanskar fyritøkur, bankar og sjálv stjórnin hava lánt og framvegis lána stórar upphæddir í Kina. Alt hetta hevur elvt til nýggj og broytt viðurskiftin landana millum.

Bushstjórnin nýtti harðligan málbur mótvegis Kina og almennt varð Ríkið í Miðjuni, sum Kina ofta nevnist, mangan avmyndað sum ein hóttan og ein leivd frá kommunistiska tíðarbilinum, sum var á veg í søguna. Fokus var við røttum sett á tróttandi mannarættindi, hóast USA kanska ikki hevur so nógv at lata onnur hoyra á hesum øki. Hetta hendi alt, samstundis sum USA lánti nógvan pening úr Kina og handilsjavnvágin millum stórveldini bæði alt meira gjørdist til fyrimunar fyr Kina.

Hetta var á mangan hátt ein lítið haldgóð støða, og Obama hevur tískil broytt málburðin mótvegis Kina. Men hann hevur broytt annað og meira enn málburðin. Hann mælir beinleiðis til at broyta myndina av Kina frá at vera ein hóttan til at vera ein samstarvspartur hjá USA. Eygleiðarar eru bilsnir av Obama, samstundis sum teir viðurkenna hansara víðskygni. Obama hevur ásannað, at USA hevur meira at vinna enn at missa við at samstarva við Kina. Hóast USA ikki kann góðtaka politisku skipanina í Kina og mangan hvassliga finnst at mannarættindatøðuni har, so hevur USA alt at vinna við at fara í tættari samstarv við sterkasta landið í Asia. Hartil kemur at mannarættindi kanska kunnu batna av meira samstarvi. Tað eru í hesum høpi teir eygleiðarar, sum halda, at USA hevur einki annað val. Kina er vorðið so sterkt hernaðarliga og búskaparliga, samstundis sum stórveldið hevur ein so skjótt vaksandi leiklut í Asia og Afrika, at USA heilt einfalt noyðist at meta Kina javnt við USA sjálvt. Heimsmyndin er við at broytast í stórum og Obama er tann fyrsti amerikanski forsetin sum hevur ásannað hetta og hevur dirvið til at siga tað.

Tað er við hesi ásannan í føringinum, at Obama vitjar eitt Kina, sum hóast stórar trupulleikar á mongum økjum hevur tikið plássið hjá ávikavist Japan og India á asiatiska oddaliðinum. Nú ræður sambært Obama um samstarv og samarbeiði í staðin fyri konfrontatión. Hetta er einfalt ein av mongum forteytum fyri, at heimurin skal hóra undan øllum teimum politisku, umhvørvisligu, búskaparligu og menningarligu trupulleikum, sum heimurin líður undir.

**Sosialurin**

## Sparingar á Sandoyarleiðini

Tað kemur sera dátt við at tað er landstýrismaðurin í vinnumálum Jóhan Dahl, ið stendur á odda fyri at mergsúgva Sandoynna enn meir.

Støðan í Sandoynni er, at fá arbeiðspláss eru í oynni. Hetta hevur so við sær at nógv fólk hevur arbeiði aðrastaðni, og **eru hesi tí beinleiðis bundin av farðleiðini um Skopunarfjørð. At tey hava starv aðrastaðni** er viðvirkandi til at arbeiðsloysi í oynni er tað lægsta í landinum. **At minka um túratali og at broyta siglingatíðinar um Skopunarfjørð ger at** vit verða **meint rakt, og kemur hetta helst at** hava við sær, at fleiri fólk verða noydd at siga starv sítt frá sær.

Tað sindrið av vinnulívið, ið er í oynni er sera tengt av sambandinum til meginlandið, og tí kemur tað okkum sera dátt við at ein borgarligur vinnumálaráðharri, skal standa á odda fyri hesum, ið okkara verð, púra burturvið sparingum.

**Vit her suðuri standa spyrjandi yvir, hvar Jóhan Dahl hevur fingið hatta sparings hugskoti frá. Hvat er endamálið við at niðurleggja og flyta teir mest brúktu túrarnar?**

Vit skilja væl at landið skal spara. Men sparið við skili! Eitt er, ið verður rópt at spara eftir reyv, og tað kann henda sparing skjótt blíva til. Ringasta støða ein kann ímynda sær, er at arbeiðsloysi tekur dik á seg í oynni, og kemur tað at spreiða seg sum ringar í vatninum í okkara lokala samfelag. Hetta kann lættliga verða byrjanin til eina kreppu, ið ger Sandoynna nógv verri fyri enn hvat hon er í dag.

Sandoyggin vil gjarna verða klár, tá tað byrjar at lýsa í aftur, og hjálpa okkum øllum fram á leið.

Gev Sandoynni og ikki minst vinnulívinum tann møguleika og leggi ikki fótonglar fyri okkum. Umhugsi tí fylgjurnar av hesi sparing enn eina fer.

Við ynski um framburð í Sandoynni, og okkara landi at frama.

**Fólkaflokkurin í Sandoynni**

## Hægri kostnað, verri tænastu!

Samhaldsfestið við tey veikaru økini í landinum hevur ikki júst vunnið frama hesa tíðina, ið eina valdømið hevur virkað. Sandoyingar kunnu longu nú staðfesta hvussu samgongan viðferð oynni á mest grundleggjandi lívæðrini – farleiðini um Skopunarfjørð.

**Fyrsta**, og sjálvandi nógv størsta, vónbrotið og álitisbrotið, var tá samgongan valdi at skjóta Sandoyartunnilin út til horna. Fyrst við at stovna skuffufelagið P/F Sandoyartunnilin, og síðani við ikki at fylgja sínum egna samgonguskjali, og flyta tær áleið 40 mió. kr. frá Norðoyatunnlinum til nýstovnaða, P/F Sandoyartunnilin. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2010 vísti eitt snøgt null.

**Annað** vónbrotið var tá ferðaendurgjaldið, fyri at noyðast at arbeiða aðrastaðni, enn her vit búgva, varð skorið við stórari upphædd. Eingin hoyring, eingin bøn. Lækkað uttan grundgeving. Eitt framstig, sum júst varð vunnið við drúgvum stríði, og sum hevði fingið javtsett okkum siglandi "pendlarar" við tey koyrandi á meginlandinum.

**Triðja** vónbrotið og afturstigið, varð tá mánaðarkortini, uttan at spyrja nakran brúkara eftir, vóru dýrkaði úr 1050 kr. upp í 1500 overnight. Onkur samgongulimur royndi at tykjast sum hann stríddist ímóti hækkingini, mest fyri at pynta egnu vangamyndina eitt sindur. Og nú gudhjálpi tú mær, bert mánaðir seinni ætlar samgongan at hækka mánaðargjaldið upp í 1875 kr. Altso ein príshækking hjá teimum bestu kundunum og sum hava mestan tørv á flutningi um fjørðin, við **78,57 %**, eftir einum hálvum ári!!! Kundarøkt er helst ikki nakað sum samgongan, gjøgnum vinnumálaráðið, hugsar um.

Nú skuldi ein trúð at byrðarnar og andróðurin hjá hesum, samanborið við meginføroyar, eftirhondini vanrøkta parti av landinum, vóru nóg nógvar. Men nei. Álopini á farleiðina hjá okkum, sum í Sandoynni búgva, halda áfram. Nú skulu vit umframt slysálopið við tunnlinum, umframt lækkaða ferðaendurgjaldið, og umframt risaferðagjaldshækkingarnar, sum tað **fjórða** eisini skerjast í túratalinum um Skopunarfjørð. So at vit framyvir ikki kunnu ferðast um fjørðin á kvøldi. Slutt við kvøldvaktum norðanfjørðs. Slutt við hugnaløtum í Norðurlandahúsinum. Og slutt við vitjanum hjá alt fleri vin og skyldfólkunum, hinumegin okkara Berlinmúr.

Skuldi ein skriva eitt handrit, um hvussu tú sum skjótast avtoftar eitt øki í einum landi, har eirindaleysur sentralpolitikkur setur dagsskránna, so er uppskriftin at fara júst soleiðis fram, sum sitandi samgonga ger í dag. Eingir óviðkomandi spurningar um sosiala tilveru, lív, og vinnufortreytir. Tað góða samfelagið, har vit øll skulu rúmast, er eftir øllum at døma bert glastrimyndin úr einum valstríði. Dagligi veruleikin, sum vit í Sandoynni líta í eyguni, er alt annað enn tað.

Vit ynskja at gera okkara lut í føroyska samfelagnum. Vit ynskja at vera við at bera byrðarnar. Men tað krevur tykkara ásannan av ójøvnu støðuni, og tykkara samhaldsfesti. Kanska skuldu tit spurt, um trupulleikin hjá greinini í dag, kann gerast trupulleikin hjá trænum í morgin.

**Sandoyar Tjóðveldisfelag**
Elisabeth Myllhamar, forkv.
Maiken Krabenhøft
Kristian Oskar Henriksen
Evald Sólvitsson
Eli Hansen

## Varðvetið túratalið hjá Teistanum

**Til Jóhan Dahl landsstýrismann í vinnumálum**

Øll kommunustýrini í Sandoyar Sýslu fara innarliga at heita á teg, um ikki at minka túratalið hjá Teistanum um Skopunarfjørð, tí tað verður til óbótaligan skaða fyri sýsluna.

Hetta er tað sama sum at grava ein landsveg av.

Teistin er okkara forlongdi armur til miðstaðarøkið. Umstøðurnar eru ringar sum er og kann hetta, við at skerja teir síðstu túrarnar og túrar sum heild, verða banahøggið til Sandoynna.

**Vinarliga Borgarstjórarnir í Sandoyar Sýslu**

Gerhard Lognberg, Skopun
Jákup Martin Sørensen, Húsavík
Linjohn Christiansen, Skálavík
Brandur Sandoy, Sandur
Harry Jensen, Skúvoy

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.